UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Umhvørvisstovan
Postbox 2048, Traðargøta 38
165 Argir

Tórshavn, tann 1. oktober 2025
J. nr.: 24/17336-5
Viðgjørt:
Tygara skriv:

**Dagføring av heimilingarskrivi til Umhvørvisstovuna um at útinna uppgávur og heimildir sambært lóg um el og fjarhita**

**Dagføringin** er, at Umhvørvisstovan eisini fær heimild at umsita undantaksheimildina í **§ 16, stk. 3** í lógini.

Dagførda heimilingarskrivi er soljóðandi:
Umhvørvisstovuni verður latið upp í hendi at útinna tær uppgávur og fyrisitingarheimildir, sum sambært løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 30. mai 2024 um el og fjarhita, eru hjá landsstýrisfólkinum. Undantiknar eru tó hesar heimildir:
1) kunngerðaheimildirnar í § 12, stk. 3, § 15a, stk. 4, § 15c, stk. 2, § 15e, stk. 4, § 15i, § 17, stk. 2 og
2) ognartøkuheimildin í § 22b.

Av tí at landsstýriskvinnan hevur avgjørt at leggja omanfyri nevndu heimildir til Umhvørvisstovuna at umsita, verður samstundis gjørt av, at avgerðir tiknar av Umhvørvisstovuni, kunnu kærast til Føroya Kærustovn sambært § 18 í lógini um el og fjarhita.

Heitt verður á Umhvørvisstovuna um at lata hetta heimilingarskriv verða tøkt alment.

Samstundis fer úr gildi "Heimilingarskriv til Umhvørvisstovuna um at útinna uppgávur og heimildir sambært lóg um el og fjarhita" dagfest 10. juli 2024.

Umhvørvismálaráðið,

Margit Stórá
landsstýriskvinna

/Pól Egholm
aðalstjóri

Avrit verður latið Føroya Kærustovni